## DAGSINS MEINING

# Lekur millum teori og praksis

Politiska støðan er ógreið, hóast løgmaður boðar frá, at hann fer at halda fram við verandi samgongu, tí hon hevur ikki meiriluta ímóti sær. Í farnu viku hoyrdu vit tveir av arkitektunum aftanfyri Stýrisskipanarlógina forsvara sítt verk. Útvarpsmaðurin legði fyri við at spyrja, um brot eru framd á hesa lóg, og svarið var sjálvandi nei. Tað var nú spell, at sendingin ikki í størri mun viðgjørdi andan í lógini og skeivleikarnar við henni. Sjálvandi er henda lóg ikki brotin. Fimmarin staðfesti tí bara nakað vit vistu.

Áhugaverdi spurningurin er, hvussu góð ella vánalig henda lóg er. Livir hon nóg væl upp til, hvussu vit best handfara og fyrisita demokratiið – fylgir hon tíðini og teimum siðum vit annars eru von við? Ein av luttakarunum helt fyri, at møguliga var lógin m.a. eitt úrslit av, at nakrir serfrøðingar vildu sleppa at brúka loysnir aðrir hava funnið fram til – uttan at hyggja til, hvat hevur verið siðvenja her.

Tá eitt valúrslit greitt vísir, at ein samgonga, ið hevur sitið í fýra ár, missir meirilutan, og veljarakanning eftir veljarakanning hevur víst, at samgongan hevur ikki undirtøku millum fólkið, átti leiðslan at tikið náttúrligu avleiðingarnar: at lata upp til tingformannin at avgera, hvør skal taka fyrsta stigið at finna eina samgongu. Her er sjálvandi eitt men, og tað er, at løgmaður er suverenur. Tá lógin gevur honum so stórt vald, vil hann treyðugt lata tað frá sær. Tað er møguliga her misseran liggur: at lógin er sjálv við at loyva eini fæstlæstari støðu í og við, at hon gevur løgmanni nærum totalt vald. Lógin gevur løgmanni status av einum forseta, hóast hann er valdur sum vanligur partapolitikari. So her lekur millum teori og praksis. Vit kunnu hava ymsar meiningar um hetta at liva upp til veljarans dóm. Hóast samgongan ikki hevur fingið ein meiriluta ímóti sær, so hava meira enn 50% av veljarunum sagt nei til samgonguna. Tá tað stendur á jøvnum í tingmannatali, hví ikki lata prosentini bestemma, eins og málini gera tað, tá stendur á jøvnum í stigum í fótbólti!

Tað er ímóti allari siðvenju og demokratiskari grundhugsan, at tapararnir tvs. teir báðir flokkarnir, ið missa, "klamra" seg til valdið við at skipa seg í eina minisamgongu, ið harvið setir fót fyri tí náttúrligu demokratisku samráðingarprosessini. Tað er væl skiljandi, at formaður Javnaðarfloksins – tó at hann vágar nógv – ikki vil inn at reparera eina falleraða samgongu, har tapandi flokkarnir hava bundið seg saman uppá hond og fót. Út frá valúrslitinum og valdsstøðu síni átti løgmaður ikki at tikið støði í verandi samgongu men farið til samráðingar við flokkarnar. Vit skilja heldur ikki ta merkiligu binding, sum er millum løgmann og E. Hví vil løgmaður, sum hevur so ringar royndir av E, ikki royna onkra loysn, har E als ikki er við? Tað er stóra gátan!

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Tórfinn ofraði sjey nevndarsessir fyri tveir

**Elin Lindenskov**
*býráðslimur í Havn*



Á býráðsfundi mikukvøldið var eg koyrd úr øllum nevndum hjá býráðnum. Hetta er beinleiðis avleiðingin av at hava arbeitt málrættað og konstruktivt. Eg havi arbeitt hart fyri barnaansingini og vil hava barnaansing til øll, men hetta vil meirilutin ikki. Vit hava víst á, at meirilutin vildi geva Høgna Mikkelsen barnagarðar at byggja. Vit hava víst á, at Jan Christiansen vildi geva einum vinmanni eina húsagrund úti í Bakka. Vit hava fingið ígjøgnum fyribyrgjandi heimavitjan hjá eldri í Havn. Vit fingu ígjøgnum hækkaðan barnafrádrátt. Vit settu ígongd upprudding av oljudálking á Havnarvág o.s.f. o.s.f....

Júst okkara arbeiðssemi er beinleiðis orsøkin til, at meirilutin fór eftir Torfinni Smith, sum var til fals fyri tveir nevndarsessir afturat. Tað var alt hann fekk.

**Borgarligu flokkarnir fingið enn fleiri sessir**

Tórfinn Smith ofraði fíggjarnevndarsessin hjá Javnaðarflokkinum til Fólkaflokkin. Harumframt tók hann sjálvur mín sess í Sosialunevnd og mín sess í Heilsu- og umhvørvisnevndini.

Frá minnilutanum hevur hann tikið nevndarsessin hjá Hildur Eyðunsdóttir í Byggi- og býarskipanarnevndini og givið hann til Schuman Hjaltalin úr Sambandsflokkinum. Givið Jákup Suna Joensen úr Fólkaflokkinum sessin hjá Jógvan Arge í Teknisku-nevnd. Harafturat hevur hann nú flutt sínar egnu nevndarsessir í Mentamálanevndini og Havnanevndini yvir í meirilutan. Hetta gevur 7 nevndarsessir, sum hann hevur flutt yvir í meirilutan. Sjálvur hevur hann einans fingið 2 nevndarsessir afturat fyri teir 7 nevndarsessirnar, hann hevur flutt í meirilutan. Nú hevur Tórfinn fýra sessir tilsamans.

**Meirilutin sigur einki í býráðnum**

Meirilutanum líkt, tók Torfinn Smith ikki so mikið sum orðið á býráðsfundinum, tá hann fór upp í meirilutan.

Soleiðis ger meirilutin. Hann greiðir ongantíð frá sínum avgerðum í býráðnum. Demokratiið er sett til viks. Avgerðirnar verða tiknar á samgongufundi ella í onkrum skýmaskoti, málini verða løgd fyri býráðið, og málini samtykt uttan at greiða frá hví. Men tað er kanska ikki so løgið, tá man sær, hvørji mál verða samtykt.

**Ikki ómøgulig - sera konstruktiv**

Jan Christiansen hevði sera ringan smakk í munninum á býráðsfundinum, og støðan var sera pínlig og spent. Hann segði, at hann ongantíð hevur sagt, at eg eri ómøgulig, hatta var nakað fjølmiðlarnir hava sagt. Hesum trúgvi eg tó ikki, tí hann verður endurgivin fyri at siga hetta í trimum miðlum: Útvarpinum, Sosialinum og Dimmalætting.

Sannleikin er, at hetta er bara ein liður í útspillingini av minnilutanum. Løgið, at tey skulu hava trupulleikar við minnilutanum, tey eru nú 9 og vit 4.

Men eitt kann eg lova Jan og øllum hinum: Har eg eri, arbeiði eg málrættað, konstruktivt og loyalt. Tað er slíkum tey eru bangin fyri.

www.lindenskov.com

# Eitt sindur um rættvísi!

**Heri Simonsen**



Nógv orð eru fallin um hvussu órættvíst býti er millum útjaðaran og miðstaðarøkið. Hyggja vit eftir valtølunum frá 30. apríl kunnu vit seta hetta sokallaða "rættvísi" í eitt veruligt perspektiv:

| Valdømi: | Atkvøður: | = | Umdømisvaldir kosta: |
|---|---|---|---|
| Suðurstreymoyar | 11.333 | = | 8 løgtingslimir á 1417 atkvøður |
| Eysturoyar | 6.582 | = | 5 løgtingslimir á 1316 atkvøður |
| Norðurstreymoyar | 2.423 | = | 2 løgtingslimir á 1212 atkvøður |
| Norðoyar | 3.947 | = | 4 løgtingslimir á 987 atkvøður |
| Vága | 1.841 | = | 2 løgtingslimir á 921 atkvøður |
| Suðuroyar | 3.407 | = | 4 løgtingslimir á 852 atkvøður |
| Sandoyar | 1.004 | = | 2 løgtingslimir á 502 atkvøður |

So sum tølini siga greitt, so kosta umdømisvaldu tinglimirnir í Eysturoynni og Streymoynni nógv fleiri atkvøður, enn umdømisvaldu tinglimirnir í sokallaða útjaðaranum. Sjálvt um Streymoyggin og Eysturoyggin fingu allar teir 5 eykavaldu tinglimirnar, eru Eysturoyar og Suðurstreymoyar valdømi kortini fyri vanbýti. Við eykavaldum tinglimum eru tølini hesi:

| | | | |
|---|---|---|---|
| Eysturoyar | 6.582 | = | 6 løgtingslimir á 1097 atkvøður |
| Suðurstreymoyar | 11.333 | = | 11 løgtingslimir á 1030 atkvøður |
| Norðurstreymoyar | 2.423 | = | 3 løgtingslimir á 808 atkvøður |

Norðurstreymoy fekk soleiðis eina rættvísa útjavning við at røkka 3. tingliminum. Meðan tey bæði størstu valdømini eru enn fyri vanbýti, sjálvt við eykavaldum tinglimum. Eysturoyar og Suðurstreymoyar valdømi eiga 58,7 % av atkvøðunum, men bert 53,1 % av tinglimunum.

So mong vóru orðini um hetta ólukku órættvísi, sum eisini kann raka miðstaðarøkið!


Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Anja Weihe anja@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.


**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.


# ítróttur

Nr. 88 • leygardagur • 11. mai 2002 • 76. árgangur • www.sosialurin.fo


# Heidi við teimum kendu

**Í flogfarinum úr Føroyum til Keypmannahavn fríggjadagin sótu Heidi Andreasen og Katrin Johansen. Leiðin gongur til Monaco, har Heidi er innstillað í kappingini um at gerast ársins ítróttarfólk við breki. Tær eru sum vera man spentar undan ferðini, og týsdagin fellur hamarin**

ÁRSINS ÍTRÓTTARFÓLK
*Stefan í Skorini*



*Heidi Andreasen er ógvuliga spent undan túrinum til Monaco. Hon hevur havt marruna í fleiri nætur á rað, tí hon í dreymi hevur gloymt alt eftir í Føroyum*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

Ferð hevur sanniliga verið á svimjingini hjá 16 ára gomlu Heidi Andreasen av Eiði. Hon hevur vunnið fleiri heiðursmerki á paraolympisku leikunum og í HM-kappingum kring heimin, og fyrr í ár varð hon eisini innstillað til at gerast heimsins besta ítróttarfólk við breki. Hon skal saman við fimm øðrum kappast um at fáa henda stóra heiður.

Tá innstillingin varð almannakunngjørd varð nógv gjørt burturúr hesum, og nú er hon so farin til greivadømi Monaco við strondina í Miðjarðarhavinum. Við í ferðalagnum er venjari hennara, Katrin Johansen, sum óivað eisini eigur heiður uppibornan fyri tey góðu úrslitini hjá Heidi Andreasen.

Heidi sigur, at hon er fegin um at vera við í hesum stóra tiltakinum, har nógv heimskend fólk luttaka. At vinna atkvøðugreiðsluna liggur avgjørt ikki fremst í huganum, men hetta er ein uppliving, sum hon fer at minnast alt lívið.

**Hevur marruna**

– Eg eri ótrúliga spent um henda túrin. Eg havi havt marruna fleiri ferðir, tá eg í dreymi havi gloymt alt viðførið eftir í Føroyum, sigur Heidi Andreasen undan túrinum til Monaco.

Tóra og Trina hjá smápartafelagnum Design hava boðið sær til at seyma kjólan, sum Heidi skal vera í, tá virðislønirnar verða handaðar. Hetta er ein vakur veitslukjóli við perlum, sum tað sømir seg í einum fínum selskabi.

Fríggjadagin fóru tær báðar til Keypmannahavn, og sunnudagin verður flogið víðari til Nice, sum er nærhendis Monaco.

Virðislønirnar verða ikki handaðar fyrr enn týskvøldið, tá stórt gallakvøld er á skránni. Mánadagin eru fleiri ymisk tiltøk at fara til. Eitt nú er ein golfkapping, har kend fólk luttaka, og fleiri tíðindafundir eru á skránni, har tíðindafólk fáa møguleikan at seta teimum kendu spurningar.

Týskvøldið klokkan hálvgum átta føroyska tíð fer høvuðstiltakið av bakkastokki. Tey innstillaðu møta tveir tímar frammanundan, og myndafólk og tíðindafólk fáa høvi at vera til staðar, tá tey stíga úr Limousine-bilum í vøkrum kjólum og klædningum.

At Heidi veruliga blandar seg við teimum kendu sæst á luttakaralistanum. Micheal Schumacher, sum er ein tann best lønti ítróttarmaðurin í heiminum, er innstillaður til ársins ítróttarfólk. Aðrar ítróttarstjørnur í Monaco eru Micheal Jordan, heimsins besti kurvabóltsleikari, Steven Gerrard, fótbóltsleikari á enska landsliðnum, Ian Thorpe, svimjari úr Australia, Tiger Woods, golfleikari úr USA, Inge de Bruijm, svimjari úr Hollandi og Venus Williams, tennisleikari úr USA. Umframt ítróttarstjørnur eru fleiri sjónleikarar og modell eisini innboðin. Nevnast kunnu Sylvester Stallone og Naomi Campbell.

Hetta er tað, sum Heidi gleðir seg mest til. At møta teimum kendu í veruliga lívinum. Hetta verður ógvuliga spennandi, tí Heidi er í hesum førinum ikki áskoðari men luttakari.

# VB er greiður favorittur

**VB fær Jón Paula Olsen við aftur í hópin til dystin móti EB/Streymi sunnudagin, og sundalagsmenn eru fullmannaðir**

STEYPAKAPPING
*Stefan í Skorini*

Sunnudagin møtast VB og EB/Streymur á Eiðinum í Vági. Hetta er fjórðingsfinalan, sum varð útsett vegna verkfall, men nú skal hon spælast. Hesi bæði liðini liggja púra jøvn eftir fyrstu tveir dystirnar í landskappingini.

VB tapti 1-0 móti TB í fyrsta dystinum, meðan EB/Streymur vann 1-0 á Skála. Hósdagin møttust hesi liðini í landskappingini, og tá vann VB 1-0 á Mølini á Eiði. Vágbingar hava tí sálarliga yvirtakið undan dystinum.

Dysturin var tó javnur, og tí hava sundalagsmenn góðar vónir undan dystinum, og teir trúgva, at tað ber til at koppa VB á útivølli. VB má tó metast sum greiður favorittur, tí vágbingar eru altíð sterkir á heimavølli.

**Marek manglar**

Marek Viersbicki, ið vanliga spælir á miðvøllinum hjá VB, hevur skaða í rygginum, og hann verður tí ikki við. Hann hevur verið skaddur í longri tíð.

Jón Pauli Olsen var ikki við í seinasta dystinum móti EB/Streymi, men hann er tøkur aftur. Hann fekk skaða í økslina undir venjing, men hvíldin hevur gjørt hann kláran aftur. VB hevur einki leikbann.

Trygvi Mortensen, venjari hjá EB/Streymi, hevur allan hópin tøkan til dystin. Eingin hevur leikbann, og eingin er skaddur.

Liðið, sum fer víðari, skal møta HB í hálvfinaluni, so tað verður torført at koma heilt til finaluna.